# Stór og bílig grundøki á Sandi

**Tey sum ynskja sær eitt stórt og gott grundøki, har ein samstundis hevur sera vakurt útsýni, eiga at venda sær til Sands kommunu. Í summar verða nevniliga fleiri grundøki tøk í bygdini, sum sambært borgarstjóranum, Páll á Reynatúgvu er sum ein vøkur náttúruperla**

BÚSETING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Á Sandi eru 182 fólk undir 18 ár, og gevur hetta góðar vónir fyri framtíðina. – Vit mugu gera okkara til, at tað unga fólkið kann búseta seg her í bygdini, sigur borgarstjórin, Páll á Reynatúgvu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Sandur: – Jú, grundøkini eru stór, vil onkur kanska siga. Eitt 750 fermetrar stórt øki er rættiliga stórt.

– Men hinvegin: Menniskjuni eru eftir mínari meining ikki búrhøsn. Og tí ynskja vit fegin at bjóða teimum áhugaðu nøkur øki í hesari støddini, sigur Páll á Reynatúgvu við Sosialin.

Hesi grundøkini, sum íalt verða 12 í tali, liggja við Sandabrekkuna. Og hagani er frálíkt útsýni yvir bygdina, vakra sandin, vatnið og fjørðin.

Kommunan eigur lendi til øki av so stórari støðd. Men borgarstjórin dylir ikki fyri hvør ætlanin er við júst hesum:

– Vit ynskja at freista fólk til at búseta seg her í okkara kommunu.

– Og við stóru grundøkjunum og tí rímiliga kostnaðinum, vóna vit at tað eisini fer at eydnast, sigur hann.

Í fyrstu syftu er ætlanin at gera sjey grundøki klár. Hesi verða væntandi seld í summar. Seinni verða so tey seinastu fimm økini klár at selja.

## Byggiáhugi

Eins og so manga aðrastaðni í landinum hevði búskaparliga kreppan ávirkan á fíggjarligu umstøðurnar hjá sandingum – og harvið eisini áhugan at byggja sethús.

Kommunan gjørdi fyri eini 20 árum síðani eina aðra útstykking í bygdini, men har eru framvegis grundøki eftir at keypa.

Staðfestast kann kortini, at í miðal hava verið bygd eini 2-4 sethús um árið, ta tíðina sum gongd var í hesum. Men sum so manga aðrastaðni kom eisini steðgur í hetta undir kreppuni.

Nú tykist støðan at vera broytt aftur til tað betra: Kommunan hevur í løtuni umsóknir liggjandi til fýra av teimum fyrstu sjey grundøkjunum við Sandabrekkuna.

Kostnaðurin fyri hvørt økið verður væntandi einar 100.000 kr.

## Stutt til Havnar

Fyri sandoyingar var tað ein stórur framburður, tá siglingin millum Skopun og Gomlurætt byrjaði.

Hesin framburður merktist tó serliga, tá tann stásiligi Teistin varð settur í sigling fyri nøkrum árum síðani.

Við hesum regluliga ferðasambandinum um Skopunarfjørð er tað nú lag á manni at ferðast millum heimstaðið á Sandoynni og arbeiðsstaðið í Havn.

Í roynd og veru er tað styttri at fara heiman av Sandi til Havnar, enn tað tekur hjá leirvíkingum at fara hagani og til høvuðsstaðin.

– Sjálvur brúki eg umleið 50 minuttir, frá tí eg fari frá húsum og til eg seti bilin frá mær á Skálatrøð í Havn. Tað ber tí saktans til hjá fólki at búgva her á Sandi og hava sítt arbeiði aðrastaðni.

– Tá tunnilin einaferð kemur undir Skopunarfjørð fer tað bert at taka 20 minuttir til Havnar. Tá vænti eg at áhugin fyri grundøkjum her verður uppaftur størri, vísir Páll á Reynatúgvu á.

Út frá hesum veruleika verður tí væntað, at eftirspurningurin eftir grundøkjum á Sandi fer at verða stórur.



*Vakurt útsýni er av Sandabrekkuni – bæði inn yvir sandin, bygdina, vatnið og sjógvin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Tunnilin nærkast

Hóast eingin tíðaráseting er gjørd, so verður arbeitt við málinum um ein framtíðar undirsjóvartunnil til Sandoynna.

Á fíggjarlógini fyri 2006 eru avsettar 5 mió. kr. til víðari kanningar av hesum máli.

Hetta málið hevur sum vera man eisini stóran áhuga fyri Páll á Reynatúgvu.

Fyri hann er eingin ivi um, at Sandoyggin eigur at vera bindiliðið millum Suðuroynna og miðstaðarøkið í framtíðini.

Tað eigur at vera óneyðugt at sigla, tá ein kann koyra beinleiðis millum hesi bæði støðini, sigur hann.